# So sig honum takk

**Í miðhæddini á gamla turkihúsinum í Leirvík letur í dag upp nýtt bátasavn. Á savninum eru fimm gamlir útróðrarbátar úr Leirvík umframt annað, sum hevur við sjógvin, serliga útróður í Leirvík, at gera**

VEIÐIMENTAN
*Edvard Joensen*

**Leirvík:** Klokkan 16 seinnapartin letur nýtt bátasavn upp í Leirvík. Tað er Osmund Justinussen, sum stendur aftanfyri savnið, sum heldur til í miðhæddini á gamla turkihúsinum. Tá savnið letur upp, verður frágreiðing um føroyskar bátar, eins og gentukór úr Leirvík fer at syngja

Spakuliga dregur tað um steinin. Tarin bleiktrar í súðinum, og smáseiðirnir smoyggja sær eitt sindur útfrá, tá maðurin kemur framvið. Hann hevur leyp á baki og er á veg inn í bátin, sum ein annar maður stendur og heldur. Klárir at fara til útróðrar. Tað eru aðrir bátar flotaðir, og ein motorbátur liggur fyri teym fyri landi.

Tað lýsir norðuri í Djúpunum, meðan teir gera klárt. Stilt er og lítið rák á Leirvíksfirði. Tað er summar og gott útróðrarvegur.

Soleiðis lýsir stóri málningurin hjá Sámali Toftenæs leirvíkingar á veg til útróðrar ein summarmorgun fyrst í tjúgundu øld. Ein stórur málningur á veggin um í sera hugnaligu hølunum, har nýggja bátasavnið í Leirvík er innrættað.

Ivaleyst er onkur, sum enn minnist Leirvík soleiðis vorðna, hóast megin parturin av dagsins leirvíkingum einki vita um tað. Í dag eru tað trolarar, og størri útróðrarbátar, stórir virkisbygningar, truckar og nógvur maskinlarmur, sum eyðkenna tað livandi havnarlagið í Leirvík. Fjøran er burtur, og betong er komið ístaðin.

Og hóast onkur heldur, at tað kanska er ikki so gott alt, sum komið er, so verður helst at ásanna, at eisini synirnir hjá Ketli høvdu rætt í sínum. Hin gamli kundi síni ting og kendi sína ábyrgd, men tíðin var farin frá honum, og tað mátti hann so at enda bara liva við.



*Teir fimm bátarnir eru høvuðslutirnir, sum eru at síggja á nýggja bátasavninum í Leirvík, sum letur upp í dag*
*Mynd: Edvard Joensen*

## Eiga søguna enn

Enn hava vit eitt sindur eftir av søgu okkara, sum vit avgjørt eiga at varðveita, sigur Osmund Justinussen, sum við hesum nýggja, prýðiliga savninum í Turkihúsinum í Leirvík hevur varðveitt ein týðandi part av føroyskari fiskivinnusøgu. Gamlar bátar, sum annars høvdu verið koyrdir burtur. Reiðskap av ymsum slagi so sum línu, kíkar, skrín og tað, sum brúkt varð. Tó saknar tú eitt vanligt snøri kortini.

Men tað man fara at koma, tí sum Osmund Justinussen sigur, so er ymiskt á veg enn.

Osmund Justinussen sigur,at broytingin, sum Føroyum var fyri í sekstiárunum, í grundini var ræðulig. Tá varð bara fyrilitaleyst blakað burtur alt, sum nýggja tíðin ikki helt seg hava brúk fyri.

Og tað var ikki bara gott, at so var, sigur hann. Tað fór rættiliga nógv av søgu okkara fyri einki. Og tað er óbótaligur skaði, at so hevur verið.

Tó er okkurt, sum bjargað er. Millum annað hesir fimm bátarnir, sum standa á savninum í Leirvík. Fýra teirra eru smíðaðir í Leirvík, meðan ein er úr Oyndarfirði, greiðir Osmund frá.

Skilti stendur í, sum sigur eitt sindur frá søguni hjá tí einstaka bátinum.

Osmund Justinussen greiðir frá einum fýramannafari, sum her er. Ein syrgilig søga um tveir brøður, sum í felag smíðaðu sær bát. Teir høvdu júst fingið hann, tá teir skuldu til skips. Skipið kom eftir teimum, og ein triðji beiggi førdi teir umborð.

Tað gjørdist einasti túrur teirra við nýggja bátinum. Teir komu ikki aftur.

## Savnið

Bátasavnið í Turkihúsinum er í grundini partur av størri savni. Í ovastu hæddini er listasavn við málningum og fotomyndum, sum eisini hoyra Leirvíkini til.

Hetta savnið lat upp í fjør, og hevur nú fingið samband við bátasavnið við trappum millum báðar hæddirnar.

Savnið er opið, og fólk kunnu koma inn á gólvið. Enn eru upplatingartíðirnar ikki heilt fastlagdar, men kunningarstovur og tílík støð vita um savnið.

Væntandi verður tað so, sigur Osmund Justinussen, at savnið verður opið seinnapartar, og at fólk verður á staðnum at greiða vitjandi frá tí, sum er at síggja.

Lutirnir, sum eru á savninum eru teir flestu úr Leirvík, hóast okkurt er, sum komið er aðrastaðni frá.

Teir fýra bátarnir, sum smíðaðir eru í Leirvík, eru allir slíkir, sum kendi bátasmiðurin í bygdini, Óli Bóndi, hevur veri uppií, greiðir Osmund Justinussen frá.

Hesin Óli Bóndi smíðaði eina rúgvu av bátum, og fleiri teirra endaðu í Íslandi.

Tað var soleiðis, at tá menn fóru til Íslands at rógva út, høvdu teir bátarnar við. Men verri enn so allir komu aftur. Teir vórðu seldir har yviri.

Tó er onkur av bátunum á nýggja savninum slíkur, sum hevur verið í Íslandi og róð út, men er afturkomin.

Tað er av reinari idealismu, at hann er farin undir hetta savnið, sigur Osmund Justinussen, Hann leggur ikki í at siga, hvat tað kostar. Men sum skilst, er tað ikki heilt bíligt. Og alt, sum inni er, er privatogn.

Hølini eru sera hugnalig og hegnisliga úr hondum greidd. Tað er Josleiv Joensen úr Leirvík, sum smíðað hevur.



*Ossi hevur lagt seg fram á stokk og skoðar verkið*
*Mynd: Edvard Joensen*








Gundur Mikkelsen:

# Byrjar egið møblavirki

*26 ára gamli Gundur Mikkelsen nýtir mest telduna at tekna møblarnar. Hann fer í næstum undir at selja møblar, hann sjálvur hevur teknað*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



**26 ára gamli vestmenningurin Gundur Mikkelsen hevur lisið til arkitekt-inrættara í Róm í eitt hálvt ár. Umframt tað eru seks tey seinastu árini farin til ymsan lesna innan list, design, merkonon, marknaðarføring og reklamusálarfrøði. Nú fer Gundur at stovna egið virki í Føroyum og Danmark**

*Heini í Skorini*

- Design hevur altíð hugtikið meg, og eg havi altíð tikist við tað kreativa, sigur 26 ára gamli Gundur Mikkelsen, sum umframt at hava lisið í seks ár í Keypmannahavn til merkonom, ymiskt innan list, design, marknaðarføring og reklamusálarfrøði, nú hevur lisið til arkitekt-inrættara í Róm í eitt hálvt ár.

Gundur hevur altíð vita, at hann er listarmaður, og hann hevur altíð havt stóran áhuga í list, skapan og tilevning. Hann sigur, at tað er ikki nakað ein lærir til, men nakað ein hevur í blóðinum. Tískil er hann farin undir hesa útbúgving í Róm.

Gundur Mikkelsen sigur, at Róm er staðið fyri arkitektar, og at hann stórtrívist í Italia, tí hansara áhugamál eru væl umboðað í list- og mentunarháborgini Róm.

- Italia og USA eru so langt frammanfyri m.a. føroyingar og danir innan arkitektur av ymsum slag, og Italia er júst staðið fyri meg, sigur Gundur. Hann sigur, at Italia er sum eitt heim fyri hann, og hann leggur afturat við einum smíli, at storkurin hevur verið púra vilstur, tá hann sjálvur skuldi vera føddur í Føroyum.

## Byrjar egna fyritøku

Gundur hevur í nærmastu framtíð ætlanir um eitt byrja egna møblafyritøku bæði í Danmark og í Føroyum.

- Eg havi ætlanir um at byrja spakuliga í nærmastu framtíð, har eg byrji við egnum virki í Føroyum og í Danmark. Vøran, eg fari at selja, verður møblar, sum eg sjálvur havi teknað, men sum vera framleiddir í Danmark. Gundur sigur, at hann hevur lagt ætlanir í tvey ár, og at alt er til reiðar.

Spurdur, um tað ikki verður stór kapping í Føroyum, og um tað yvirhøvur er grundarlag at byrja uppá slíkt, sigur Gundur, at tað óttast hann ikki.

- Eg havi lagt ætlanir og kannað hetta í tvey ár nú, og so havi eg eisini teknað sera nógv. Mín vøra er eisini øðrvísi enn tað, vit vanliga síggja her. Gundur fer aftur til Róm í oktober, men hóast tað kann hann hava fyritøkur koyrandi bæði í Føroyum og í Danmark. Um tey røttu fólkini verða sett at arbeiða, skuldi tað ikki verið nakar trupulleiki, sigur hann.

## Eins og Versace og Armani

Gundur byrjar at selja møblar av ymsum slag, og hann sigur, at tað vera elagantir, einfaldir og tíðarleysir møblar. Men seinni er ætlanin eisini at byrja uppá klædnasølu. Síðani verður kanska farið til aðrar vørur sum brillur, skógvar, luktilsi o.s.fr.

- Hyggja vit at teimum stóru merkjunum, so sum Armani og Versace, eru tey serliga kend fyri klæðir. Men hesi stóru merkir framleiða eisini alskyns vørur, sum yvirhøvur ikki hava nakað við hvørt annað at gera. Og fyri stuttum byrjaðu bæði merkini eisini at framleiða og selja møblar.

Gundur hevur á munni, at á sama hátt ætlar hann at fara til verka. Fyrst við møblum, men síðani at víðka søluna til aðrar vørur eisini.

Fyritøkan hjá Gunduri Mikkelsen hevur verið skrásett eina tíð, og Gundur er so smátt farin undir at keypa maskinur og tilfar til teknistovu.

## Ringt at koma í gongd

Tá ein ikki hevur stóra byrjunarupphædd, er torført at fara í gongd við egnari fyritøku. Júst á hesum økinum er lesnaður hansara til merkonom sera hentur, og hetta var júst orsøkin til, at hann las til merkonom.

- Um eg seti røttu fólkini í starv, fái røttu leiðarar og røttu handilsfólkini, samstundis sum samarbeiði er ein týdningarmikil partur, haldi eg, at møguleikarnir eru góðir, sigur Gundur Mikkelsen.

Merkið, sum eftir ætlan skal vera selt, eitur Follend, og er tað millumnavnið hjá Gunduri Mikkelsen og eitt gamalt familjunavn. Hetta slagið av møblum, sum Gundur fer at selja, er sera øðrvísi og kanska eisini sjáldsamt í Føroyum.

- Føroyingar eru kanska ov konservativir, tá tað kemur til møbladesign. Teir eru 10 ár aftanfyri t.d. Danmark, sum aftur er 10 ár aftanfyri Italia og USA. Føroyingar eru ov smædnir, og tað er ov lítil virðing fyri listini. Um ein ikki dámar okkurt, sum verður sýnt fram, kundi ein í hvussu so er farið og vita hvat tað er, sigur Gundur Mikkelsen.

Gundur fer ikki at satsa uppá at vinna nakað inn í Føroyum, og hann ætlar bert at royna fyri fyrst. Danmark er eitt størri land, har er lættari at fáa høli, og sostatt er møguleikin betri at vinna nakað í Danmark. Har er lættari at fáa slíka fyritøku upp at standa.

- Eg satsi uppá at kunnað opnað okkurt næsta summar í Danmark, og einaferð í framtíðini hevði eisini verið stuttligt at kunna selt í sjálvum Róm, sigur Gundur Mikkelsen. Slíkt hoyrir stórbýnum til, og tað er har, lættast er at byrja.

## Møblar vísa persónligheit

Eins og klæðir hava møblar eisini eina ávísa ávirkan á, hvat tú heldur um ein persón. Tað er ein ávís persónligheit við heiminum hjá einum persóni ella einum húski, og eins og við klæðum, vísa møblar ofta á persónin.

- Møblar kunnu vera avslappandi, humoristiskir, symbol uppá okkurt, o.s.fr. Tískil peika møblar ofta á persónin, sum eigur teir, sigur Gundur.

- Ikki tað at møblar eru statussymbol, men teir siga nógv um fólkini, sum búgva har, tí fólk vitja hvønn annan meiri nú enn fyrr.

## Kemur á marknaðin skjótt

Gundur hevur ætlanir um, at onkur vøra hjá honum vónandi kemur á marknaðin longu um fjúrtan dagar. Hann sigur, at um hann kanska fær eitt høli í t.d. SMS, kundi hann sýnt fram og selt okkurt.

Alt er komið uppá pláss viðvíkjandi fyritøkuni, men allíkavæl tekur tað tíð at koma í gongd við hesum.

Spurdur um, hvussu hann nú av álvara fer til verka, svarar Gundur:

- Ikki í dag, heldur ikki í morgin, men eitt sindur í dag, og eitt sindur meiri í morgin. Hetta er politikkurin hjá honum, at arbeiða seg spakuliga uppeftir.

Vit ynskja Gunduri góða eydnu við fyritøku og framtíðarætlanum hansara, og vónandi verður merki hansara Follend einaferð eitt vælumtókt, nógv umbiðið og kent merki. Um 26 ára gamli vestmenningurin Gundur Mikkelsen nakrantíð kemur á hædd við merkir sum t.d. Armani og Versace, má tíðin vísa.